

## Bóndin í Sumba til Havnar

Arnfríð Hentze er bóndi í Sumba, og seinastu vikurnar er hon blivin landskend í sendingini Fólksins Rødd hjá Kringvarpi Føroya. Leygardagin kemur Arnfríð ein túr til Havnar, og tá verður ikki spart upp á krútið. Arnfríð skal til frisør, til make-up fólk, í klædnahandil, og hon verður innkvarterað á Hotel Tórshavn. Tað verður tí ein nakað broyttur bóndi, sum vitjar í Hvonn Live leygarkvøldið. Har práta vit við hana um lívið í Sumba, um at verða við í Fólksins Rødd og um ein øðrvísi dag í høvuðsstaðnum.





## Ingi og Sonhard siga sína meining

Kringvarp Føroya hevur við sendirøðini Fólksins Rødd rættiliga sett meiniga føroyingin í andglettin. Fólk kring landið siga sína hugsan um ymisk evni, og tað er bæði hugvekjandi og undirhaldandi. Leygarkvøldið fáa vit vitjan av Inga Sørensen og Sonhard Johannesen, sum øll eru við í Fólksins Rødd. Vit tosa við teir um at verða røddin hjá fólkinum, um at siga sína meining alment, og um hvussu tað er at blíva kend kring landið.



## Troyggjan er ein stjørna

Stjørnutroyggjan hjá Guðrun & Guðrun er umvegis sjónvarpsrøðina „Brotsgerðin“ veruliga komin út í heim. Fyrst gjørdist troyggjan eitt hitt í Danmark, men nú eru bretar falnir fyri bæði sjónvarpsrøðini og stjørnutroyggjuni. Vit spyrja, hvat er so serligt við stjørnutroyggjuni, og hvat góða umrøðan uttanlands hevur at siga fyri Guðrun & Guðrun og føroyska sniðgeving.



## Hallur og dóttirin spæla

Countrykongurin Hallur Joensen er kendur kring alt Føroyar og eisini uttanfyri landoddarnar. Men Hallur eigur eisini eina dóttir, sum dugir at syngja og sum hevur verið á palli saman við honum nakrar ferðir. Nú leggja tey leiðina framvið í Hvonn Live. Prátað verður við tey bæði, og tey spæla tveir sangir live fyri okkum.

hvonn ★★★★★ LIVE

# Leygarkvøldið

19. mars 2011 kl. 20.00

Sosialurin 341800